


Ein 22 mánaðar gamal Mazda 6 til sølu um hóskandi boð fæst.
Bilurin hevur alla útgerð umframt 18" krom felgur úr USA. Nýggj heilársdekk fylgja við.

**Tlf 218111**



## Endurlýsing

## Søkt verður eftir

**námsfrøðingi til frítíðarskúlan í Trongisvági**

**Stovnslýsing:**
Frítíðarskúlin er normeraður til 24 børn í 1. og møguliga 2. og 3. flokki. Hildið verður til í høli hjá Trongisvágs skúla

**Starvið:**
Talan er um eitt námsfrøðiligt starv 25 tímar um vikuna. Arbeiðstíðin er 11.00 - 16.30. Starvið verður sett skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu.

**Vit vænta av tær:**
- At tú hevur góð samstarvsevnir og ert álítandi.
- At tú tekur ábygd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- At tú vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum.
- At tú ert nærløgd/lagdur og vísir umsorgan
- At tú ert kreativ/ur
- At tú vísir áhuga og ynskir at mennast í arbeiðinum.

**Lønarviðurskifti:**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um námsfrøðingur ikki fæst til starvið, verður hjálparfólk sett tíðaravmarkað ístaðin. Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Siri Mortensen, virkandi leiðara, á tlf. 372750.

**Umsókn:**
Saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum skulu verða Frítíðarskúlanum, FO-826 Trongisvágur í hendi í seinasta lagi mikudagin 26.oktober 2005.

TVØROYRAR KOMMUNA

**Tvøroyrar býráð**



## LEIRVÍKAR KVØLDSKÚLI

*veturin 2005-06*

| Lærugrein | Tíð | Lærari | Tilmelding |
|---|---|---|---|
| Teld á byrjunarstøði | Mikud. 19.00-20.30 | Jákup Meinhard Sólbjørg | Tlf. 443273 |
| Máling og list | Hósd. 19.00-21.15 | Jóannes S. Hansen | Tlf. 447864 |
| Ættargransking | Hósd. 19.00-21.15 | Kristian Martin Eliassen | Tlf. 443252 |
| Trummur | Týsdag seinnapart | Kári Streymoy | Tlf. 220679 |
| Guitar | Týsdag seinnapart | Heri Joensen | Tlf. 223735 |

Luttøkugjaldið er kr.300,-
Undirvísingin er treytað av nóg góðari undirtøku.
Byrjað verður í viku 42, tó byrjar telvingin í viku 43

LEIRVÍKAR KVØLDSKÚLI TLF.443234 - 214204


# Konsertvitjan úr Íslandi

**Blásikvintett Reykjavíkur hevði skúlakonsert í Tórshavnar Musikkskúla**

KONSERT



í síðstu viku var skúlakonsert við Blásikvintett Reykjavíkur í Musikkskúlanum í Havn.

Nógvir musikkskúlanæmingar vóru samankomnir at lurta eftir blásitónleiki. Tað var kenda Blásikvintett Reykjavíkur, sum spældi fyri næmingunum.

Tónleikararnir í kvintettini starvast í Íslendska Symfoniorkestrinum, tó er floytuleikarin Bernharður Wilkinson nú búsitandi í Føroyum. Hann starvast í Tórshavnar Musikkskúla og er dirigentur hjá Føroya Symfoniorkestrið. Hinir í blásikvintettini eru Daði Kolbeinsson, obo Einar Jóhannesson, klarinett Hafsteinn Guðmundsson, fagot og Jóseph Ognibene, horn. Blásikvintettin spældi eina lætta skrá, og greiddu tey frá ymsu ljóðførunum, og fingu næmingarnir nógv burturúr hesi forkunnugu vitjan.

Konsertin kom í lag í samstarvi við Konsertfelagið, Føroya Symfoniorkestur og Tórshavnar Musikkskúla.




**Um Gud vil verður**
Samfelagsstevnan 2. - 6. november 2005

Evni: Gud er mentur

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mikudagin | 2. november | kl. 20.00 | í Ebenezer |
| Hósdagin | 3. november | kl. 10.00 | í Ebenezer |
| Hósdagin | 3. november | kl. 16.00 | í Ebenezer |
| Hósdagin | 3. november | kl. 20.00 | í Ebenezer |
| Fríggjadagin | 4. november | kl. 10.00 | í Ebenezer |
| Fríggjadagin | 4. november | kl. 15.00 | í Ebenezer |
| Fríggjadagin | 4. november | kl. 20.00 | í Ítróttarhøllini á Nabb |
| Fríggjadagin | 4. november | kl. 22.30 | í Ítróttarhøllini á Nabb |
| Leygardagin | 5. november | kl. 16.00 | í Ítróttarhøllini á Nabb |
| Leygardagin | 5. november | kl. 20.00 | í Ítróttarhøllini á Nabb |
| Leygardagin | 5. november | kl. 22.30 | í Ítróttarhøllini á Nabb |
| Sunnudagin | 6. november | kl. 10.00 | í Ítróttarhøllini á Nabb |
| Sunnudagin | 6. november | kl. 12.15 | í Ítróttarhøllini á Nabb |
| Sunnudagin | 6. november | kl. 16.00 | í Ítróttarhøllini á Nabb |
| Sunnudagin | 6. november | kl. 19.00 | í Ítróttarhøllini á Nabb |

Øll eru vælkomin

**Samkoman í Ebenezer**


# Fleiri nýggj postnummur

POSTNUMMUR

Postverk Føroya hevur gjørt av, at økja um postnummrini frá 1. november. Talan verður um, at postsmogur á størstu posthúsunum kring landið fáa egið postnummar. Frammanundan hava postsmogur í Tórshavn og á Argjum egið postnummar. Nýggju postnummrini verða:

215 Sandur (postsmogur)
355 Vestmanna (postsmogur)
375 Miðvágur (postsmogur)
405 Oyrarbakki (postsmogur)
535 Fuglafjørður (postsmogur)
610 Saltangará (postsmogur)
710 Klaksvík (postsmogur)
810 Tvøroyri (postsmogur)
910 Vágur (postsmogur)

Aftrat hesum fær Válurin í Vestmanna egið postnummar. Hetta verður postnummar 358 Válur. Válurin er partur av Kvívíkar Kommunu. Tilskriftin á posti til Válin skal í framtíðini skrivast á fylgjandi hátt:

Persónsnavn
Gøtunavn og húsanr.
358 Válur

– Viðskiftarfólk, sum hava postadressu á nevndu støðum, verða biðin um at taka við nýggju postnummrunum skjótast til ber. Her skal serliga hugsast um at broyta forprentað brævapappír og bjálvar og broyta adressur í telduskráum og ikki minst at boða postsendarum frá broytingini, t. d. almennum stovnum, telefelagnum, oljuveitaranum o.l., sigur Postverk Føroya í tíðindaskrivi.

## Fingið nýggja heimasíðu

Almenni føroyski hittlistin í Útvarpi Føroya hevur fingið nýggja heimasíðu, tann svarta og neongrøna síðan hevur verið inngongd til hittlistan í nógv ár, men nú er útsjóndin dagførd, mildir hvítir og ljósabláir litir prýða síðuni.

Annars eru upplýsingarnar tær somu á síðuni, sum vóru á tí gomlu síðuni.

**nud**